## Rangers vann Old Firm

Um vikuskiftið spældu Celtic og Rangers ímóti hvørjum øðrum fyri 385. Ferð. Dysturin millum stóru feløgini í Glasgow verður kallaður Old Firm, og hesaferð vann Rangers dystin. Úrslitið gjørdist 2-1, og bæði málini skoraði Kenny Miller. Hóast Rangers vann hendan dystin, er tað Celtic, sum í løtuni liggur á odda í skotsku landskappingini. Men nú er bert eitt stig á muni millum tey bæði stórfeløgini.

## Kongafelagið fall

Real Madrid tapti fyri fyrstu ferð í ár landskappingardyst. Real Madrid spældi ímóti Sevilla, og tað endaði við, at Sevilla vann dystin 2-1. Og tað var uppiborið, tí málmaðurin hjá Real Madrid vísti satt stórspæl í dystinum. Real Madrid spældi uttan superstjørnuna Cristiano Ronaldo, og hann varð saknaður. Nú er Barcelona einsamalt á odda í sponsku landskappingini – trý stig frammanfyri Real Madrid og Sevilla.

### Neistin-Stjørnan 17-32 (8-15):

# Stjørnan í stórformi



Stjørnan hevði greitt fokus á uppgávuni, tá tær uttan nakað sum helst hóvasták vundu burtur úr Neistanum

Mynd: Álvur Haraldsen

**FAKTA**

**Neistin-Stjørnan 17-32 (8-15)**
**10 min:** 3-5
**20 min:** 7-11
**40 min:** 11-21
**50 min:** 13-26
**Málskjúttar**
**Neistin:** Jacklin Durhuus 5, Unnur Danielsen 3, Katrin á Neystabø 2, Anja Heinadóttir 2, Louisa Andreasen 2, Birita Wardum 2, Rakul Augustinussen 1
**Stjørnan:** Valentina Suciu 7(2), Joan Midjord Djordjevic 5, Durita Ljósstein 4, Simona Petersen 4(2), Maria við Neyst 3, Hanna Mikkelsen 2, Ella Petersen 2, Edith Hansen 2, Durita Mikkelsen 1, Shari Mikkelsen 1, Una Olsen 1
**Brotskøst:** Neistin 1, Stjørnan 4
**Útvísingar:** Neistin 6, Stjørnan 2
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

**Neistakvinnur fingu ikki eitt bein til jørðina, tá tær tóku móti Stjørnuni sunnudagin**




Jákup Mørk

Stjørnan læt ongan sum helst iva vera um, at tær aftur í ár eru ein av mest seriøsu FM-biðlunum.

Móti Neistanum, sum aftur í ár hevur verið fyri stórum skiftingum á liðnum, settu klaksvíkarkvinnur seg á tað allar mesta frá fyrsta bríksli.

Roknað varð annars við, at talan kundi verða um eitt slag av styrkisroynd, men tað gjørdist talan tó ongan tíð um. Styrkismunurin var snøgt sagt alt ov stórur, og sterku bakketuni á odda streyk Stjørnan alt fyri eitt avstað.

Sum dysturin leið, so var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin hjá Stjørnuni skuldi verða, og mest av øllum mundu bláu heimakvinnurnar vera glaðar, tá hallarfloytan ljóðaði fyri seinastu ferð.

**Sunset-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 65 | 36 | 29 | 4 |
| 2 | Tjaldur | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 72 | 49 | 23 | 4 |
| 3 | Neistin | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 42 | 53 | -11 | 2 |
| 4 | VB | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 21 | 25 | -4 | 0 |
| 5 | StÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 25 | 32 | -7 | 0 |
| 6 | VÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 43 | 73 | -30 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 63 | 49 | 14 | 4 |
| 2 | StÍF | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 60 | 47 | 13 | 4 |
| 3 | VÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 58 | 54 | 4 | 2 |
| 4 | Kyndil | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 56 | 61 | -5 | 2 |
| 5 | H71 | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 48 | 55 | -7 | 0 |
| 6 | KÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 46 | 65 | -19 | 0 |

### VÍF-Tjaldur 24-40 (7-23):

# Meistararnir vóru til reiðar

**VÍF slapp ongan tíð at kløkka Tjaldur, og so gjørdist talan um trivaligan stórsigur til meistararnar**

Fyri viku síðani lat VÍF eitt lítið ávaringarskot av, tá tær eina løtu loyptu hvøkk á steypavinnararnar úr Klaksvík.

Tí var Tjaldur ávarað um, at hóast tær vóru favorittar, so kemur eingin sigur av sær sjálvum, og frá fyrsta bríksli trumlaðu tær VÍF niður.

Ungu genturnar á heimaliðnum sluppu veruliga at royna, hvussu tað er at spæla móti nøkrum av bestu útlendsku spælarunum í føroyskum hondbólti, og bæði Adina Petrea og Cornelia Rimbu dusaðu sær av álvara í VÍF-verjuni, sum eingi vápn tóktist at hava yvirhøvur móti sterku skjúttunum.

Tapið staðfestir støðuna hjá VÍF sum eitt av veikaru liðunum í deildini. Men hinvegin hava tær nú spælt móti teimum báðum liðunum, ið á pappírinum verða roknað sum tey sterkastu, og so er spurningurin, hvussu stórar royndirnar eru, sum eru komnar burtur úr hesum báðum dystunum.

**mørk**

**FAKTA**

**VÍF-Tjaldur 24-40 (7-23)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Tóra Seloy 6, Liljan Djurhuus 5(1), Rannvá á Røgvu 4, Heidi Joensen 4, Halla Midjord 3, Rakul Joensen 1, Finngerð Jensen 1
**Tjaldur:** Adina Petrea 12(2), Cornelia Rimbu 11, Marinela Patru 6, Annika Thomsen 5, Sarah Ann B. Thomsen 3, Elinbjørg Hammer 2, Jóhanna í Króki 1
**Brotskøst:** VÍF 3, Tjaldur 3
**Útvísingar:** VÍF 1, Tjaldur 6
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen